## DAGSINS MEINING

# Óvissa ræður

Stríðið í Sjálvstýrisflokkinum tók eina heldur óvanliga vend í vikuskiftinum. Eftir at Sámal Petur í Grund hevði boðað frá, at hann ætlaði at bjóða Helenu Dam á Neystabø av gjørdi hon greitt, at hon fór ikki at stilla upp til formansvalið. Á landsfundinum tók Helena fulla stigið og segði seg frá sum forkvinna. Fundurin var annars ikki viðtøkuførur og mátti tískíl avlýsast. Aftrat tí hendi tað óvanliga, at lokalfelagið hjá Sámal Peturi als ikki møtti upp. Somuleiðis hevði landsnevndarformaðurin boðað frá, at hann kom heldur ikki á fundin.

Neyan nakar ivast nú í, at tað eru stórir trupulleikar innanhýsis í Sjálvstýrisflokkinum, og at stigið hjá Sámal Peturi at stilla upp til formansvalið kann fáa uppaftur størri avleiðingar fyri flokkin. Hann sigur, at orsøkin til at hann stillar upp eru tær mongu áheitanir hann hevur fingið og síðani ónøgd við leiðsluformin hjá fráfarnu forkvinnuni. Hon hevur ov lítið samband við røturnar vil hann vera við.

Hvussu og ikki, so hongur lagnan hjá flokkinum í einum klønum tráð. Veljarakanningarnar hava heldur ikki verið ov góðar fyri flokkin, ið stendur til at missa eitt tingfólk. Skulu vit taka manglandi uppbakkingina, sum Sámal Petur í Grund eftir øllum at døma fær frá sínum egna valdømi, so hongur hansara egni tingsessur í klønum tráð. Hóast kanónvalið seinast, so vita vit, at einki stendur í stað í politikki. Helena Dam á Neystabø er annars kend fyri at vera góður taktikari. Man hon nú fara at gera alt fyri at verða afturvald í Suðurstreymi og harvið gerast einasta tingfólk hjá flokkinum? Hvat skal Sámal Petur tá brúka formanssessin til! Man Helena ikki leggja tvey og tvey saman, um hon ynskir Sámal Petur har piparið grør og hugsa sum so, at stillar hann einsamallur upp til fólkatingsval er líkt til, at hann fer at fáa eitt sera vánaligt val. Hetta saman við tí samhuga, sum hon kann fáa eftir innanhýsis stríðið, kann so verða nokk til, at flokkurin bert fær ein tingmann, og hann fellur á størsta valdømið Suðurstreym.

Støðan í Sjálvstýrisflokkinum er áhugaverd og viðkomandi fyri okkum øll, tí hóast lítil, so hevur flokkurin oftani ein avgerandi leiklut, tá samgongur skulu skipast. Og tá hugsað verður um, hvussu tætt er millum flokkarnar og blokkarnar, so kann Sjálvstýrisflokkurin eisini við bert einum tingmanni, gerast tungan á vágskálini. Hvør tá er tann sterki maðurin ella sterka kvinnan í flokkinum kann tá eisini vera avgerandi fyri, hvønn flokk ella blokk Sjálvstýrisflokkurin helst vil stuðla eftir eitt val. Seinast valdi man m.a. tjóðveldisflokkin sum partnara, men vit hava sæð, at hetta samarbeiðið hevur nærum køvt Sjálvstýrisflokkin. Tí vil tað vera rættiliga innilýsandi, at komandi leiðslan í flokkinum fer at hyggja sær eftir øðrum samstarvspartnarum, og her átti Javnaðarflokkurin at verið ein upplagdur partnari. Ikki minst tá vit hyggja eftir stevnuskráunum. Støðan kann tó eisini gerast tann, at tað als ikki verða boð eftir Sjálvstýrisflokkinum, tá avtornar. Men nógvir eru leikirnar í hesum talvi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkatingið er felagstingið hjá øllum, sum hava sama ríkisborgararrætt

**Edmund Joensen**



Tað er tí so ómetaliga týdningamikið, at umboð við hjartanum á røttum stað verða vald í hesar týdnigarmiklu sessir. At fólkatingssesssirnir ikki verða mannaðir av hálvhjartaðum umboðum úr Føroyum. Og slettis ikki av loysingarumboðum hvørs fremsta mál er at avtaka fólkatingssessirnar.

Hvussu vit enn seta tingini upp, so er útsýnið best og brúgvin út í heim nógv best vard ígjøgnum ríkisfelagskapin.

Fyri okkum í Sambandsflokkinum er altavgerandi spurningurin. Hvør arbeiðsháttur við onnur lond gevur okkum føroyingum bestu sømdir og flestu menningarmøguleikar á øllum økjum.

Hvussu eru vit sum lítið land best vard ímóti hóttanum á penigaøkinum, á verjupolittiska økinum, sum á so nógvum øðrum økjum. Hvussu eru vit sum lítið land best vard í stór pollittiskum høpi? À hvørjari brúgv er útsýnið best. Hvussu tryggja vit okkara fólki bestu atgongd til útbúgving og gransking o.s.fr.

Vit sambandsfólk krevja nógv størri albogarúm - vit vilja ígjøgnum ríkisfelagskapin hava allan alltjóða pallin at virka á. Vit sambandsfólk hava nógv størri visiónir enn loysing og fullveldi rúma.

### Felags lóggávuting

Føroyar og Grønland hava meira enn fulla umboðan í Fólkatinginum, mált eftir fólkatalinum. Fólkatingið er lóggávutingið hjá øllum borgarum í ríkinum í felags málum.

Fólkatingið varar av felagsøkjunum, varar av felags fíggjarlógini fyri alt ríkið, sum umfatar Danmark, Føroyar og Grønland. Tað vil siga blokkinum og játtanunum uttanfyri blokkin so sum verjumál, utttanríkismálum, ambasadum, dóms og rættarmálum. o,m a.

Trý lógávuting eru í samlaða kongaríkinum - Fólkatingið, Føroya Løgting og Grønlendska Landstingið.

Føroya Løgting og Grønlandska Landstingið lógeva einsimøll í yvirtiknum málum. Ì felagsmálum, tað vil siga, uttanríkismálum, verjumálum, dóms og rættarmálum, familjumálum, kirkjumálum o.ø. er skipanin tann, at Føroya løgting og Grønlanska landstingið gera ríkislógartilmælir. Lógirnar kunnu setast í gildi í Føroyum og Grønlandi ella ikki. Lógirnar kunnu her umframt verða tillagaðar føroysk ella grønlendsk viðurskifti.

Hvussu vit enn seta tingini upp, so sleppa vit ikki uttanum tann veruleika, at brúgvin út í heim er nógv breiðari og nógv best vard ígjøgnum ríkisfelagsskapin.

Tí er so týdningarmikið, at vit sum hava størstu hugsjónirnar, breiðastu visiónirnar, standa saman til folkatingsvalið.

# Pensjonistar fáa rokning fyri at arbeiða

**Eivind Jacobsen**
*2001-10-26*



Í hesum døgum verður tosa um at broyta lógina, sum sigur, at tá starvsfólk hjá tí almenna fylla 67 skulu tey úr starvi.

Enn hevur eingin nevnt trupulleikan hjá teimum 67 ára gomlu, sum arbeiða eitt sindur, umframt at tey fáa pensjón. Í dag er veruleikin tann, at umframt at tey skulu gjalda skatt av hesari inntøku, so missa tey eisini burtur av pensjónini. Tí hendur tað hjá fleiri, sum ikki hava fulltíðarstarv, men bert arbeiða nakrar tímar hvønn dag, at tey fáa rokning fyri at arbeiða.

Hesum fólkum dámar at hava okkurt at takast við. Tey eru fleiri, sum kunnu fáa okkurt arbeiði, men um tey fáa rokning, í staðin fyri løn, er væl skiljandi at hugurin minkar. Í hesum døgum, tá trupult er at fáa arbeiðsfólk, hevði tað verið sera gott um lógin bleiv broytt, soleiðis at tað loysur seg hjá pensjonistum at arbeiða eitt sindur. Tey kunnu tá framhaldandi geva av sínum royndum til yngra ættarliðið til mikið gagn fyri alt samfelagið. Tí eigur lógin at broytast soleiðis at pensjonistar ikki fáa rokning fyri at fara til arbeiðis.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# 4 ára skiftistíðin byrjar 1. januar

**Jan Johannesen**

Men enn kanst tú vera við til at steðga loysingarætlanini hjá landsstýrissamgonguni. Lat landsstýri fáa ein forsmakk 20. november uppá komandi løgtingsval! So kunnu teir beinanvegin byrja at pakka kuffertini úti í Tinganesi!

Skilkonan Helena Dam á Neystabø sigur við Internet-Sosialin, at Sjálvstýrisflokkurin hevur bjarga skiftistíðini og sitat: »Hevði ikki so verið, varð skiftistíðin bara fýra ár, sum hevði verið til skaða fyri føroyingar, segði hon. Tá hevði livifóturin lækkað munandi.«

### Helena misskilur skiftistíðina

Men her mistekur Helena seg dyggiliga. Ætlanin hjá landsstýrinum um ”eina miðvísa fullveldisætlan,” sum var samtykt í løgtinginum tann 20. apríl í ár, fær hesi orð frá forsætisráðharranum: »Det er fortsat regeringens helt principielle opfattelse, at der er en sammenhæng mellem ansvar og økonomi, og det er således regeringens holdning, at statens tilskud til Færøerne må aftrappes over en 4-årig periode under forudsætning af, at Lagtingets beslutning står ved magt de kommende år.« Hesi orð fullu 9. mai í samband við orðaskifti um Føroyar í Fólkatinginum.

Og seinni í somu røðu, sigur hann: »Vi kan ikke først indgå en 3-årig aftale om bloktilskuddet og så efterfølgende lægge en 4-årig aftale oveni. Hvis suverenitetsplanen som indeholdt i landsstyrets beslutningsforslag står ved magt de kommende år, er det 4 år i alt, der er tale om. Derfor finder regeringen det rigtigst, at de kommende bloktilskudsforhandlinger alene kommer til at omfatte ét år, nemlig år 2002.«

### Umráðandi, at andstøðan vinnur

Hetta er greið tala. 4 ára skiftistíðin byrjar 1. januar, og kann bert broytast, um so er, at løgtingssamtyktin frá 20. apríl verður broytt. Tí er umráðandi, at andstøðan vinnur komandi løgtingsval. Varðveitur samgongan hinvegin meirilutan, so heldur 4 ára skiftistíðin fram í 2003 og blokkstuðulin er forsvunnin 1. januar ár 2006.

Samgongan skal ikki vænta sær ein øðrvísi politikk frá einari møguligari borgarligari stjórn, tí ein stórur meiriluti á fólkatingi tók undir við forsætisráðharranum.

Aftaná eina veljarakanning, sum greitt boðaði frá, at veljarin ikki tók undir við fullveldisætlanini, valdi løgmaður at avlýsa fólkaatkvøðuna, tí hann ræddist fólksins vilja. Hevði løgmaður slept ætlanini, so hevði hann lurta eftir føroyska fólkinum. Men hann valdi at feia demokratiska viljan inn undir gólvteppi.

### Álvarsamasta fólkatingsval síðani 1948

Føroyski veljarin noyðist at taka støðu til landsstýrisætlanina. Teir veljarar, sum vilja varðveita rættindini í ríkisfelagsskapinum, kunnu á fólkatingsvalinum 20. november geva landsstýrinum ein forsmakk uppá løgtingsvali. Og teir veljarar, sum ikki vilja loysa við 4 ára skiftistíð, kunnu gera tað sama. So munnu flytibilarnir fara at vera skjótir uttanfyri dyrnar í Tinganesi.

Sambandsflokkurin bjóðar seg enn einaferð fram sum ein flokkur, sum vil styrkja um ríkisfelagsskapin. Ein borgaravinarligur flokkur, sum vil arbeiða fyri góðum umstøðum hjá tí einstaka føroyinginum. Ein flokkur, sum vil virka fyri einari nýggjari, rúmligari og tryggari loysn innanfyri ríkisfelagsskapin. Valið er títt!

Email: jan.joh@12mail.dk

# Høgni Hoydal, óbetingað

**Johan Mortensen**



Høgni Hoydal er besta boð føroyinga uppá komandi Fólkatingslim okkara. Við síni altíð siðiligu, høvisku og intelligentu framferð hevur hann vunnið sær nógv viðhaldsfólk og virðing millum danskar politikarir. Hesi skjótt fýra árini sum Høgni hevir sitið í Landsstýrinum er langt komið á sjálvstýrisleið. Tá nú Høgni fær eitt skeið á Danatingi verður hann førur fyri endaliga at greiða setningin : hitt føroyska Fullveldi við einum virðiligum samstarvi við donsku tjóðina og við virðing fyri felags áhugamálum ikki minst á vinnuliga økinum. Høgni vil geva Fólkatingsessinum tann føroyska identitet sum sessurin ikki hevur havt í nógv ár.

Høgni umboðar tað nýggja ættarliði av modernaðum føroyskum politikarum sum kenna sannroyndina at ein føroysk suveræn tjóð hevur fyri neyðuni at hava vinnuligt og mentunarligt samband við allar tjóðir fyri at kunna trívast og yvirliva. Tað er henda sólarklára boðskap sum Høgni betur enn nakar annar er førur fyri at bera fram.

Høgni umboðar tann modernaða vongin í Tjóðveldisflokkinum sum er greiðir yvir at vælferð okkara byggir á fiskimannin á Munkagrunninum og kvinnurnar við reinskeriborðini, alt tað sum okkara andans og handans verkamenn framleiða, heldur enn blokkstuðul og náðibreyð, og á eitt virkið, vælvirkandi og profitskapandi vinnulív sum okkara Fólkatingsumboð skal stuðla í altjóða og EU høpi í sínum arbeiði á Christiansborg.

Eg fari at heita á øll ungfólk á virkjum og skúlum kring landið um at sýna Fólkatingsvalinum og Løgtingsvalinum ans. Tað er jú tykkara framtíð sum verður avgjørd á hesum valum. Bert við at vera aktiv hava tit ávirkan. Høgni er tykkara maður !

Latið Tjóðveldisflokkin gera góðar tíðir enn betri. Veljið Høgna Hoydal !

# Almenn útbjóðing ella innboðin

**Jógvan Arge**
*býráðslimur*



Las við áhuga sjóforkláringina, sum Heðin Mortensen hevði í Dimmalætting leygardagin um ta nýggju útbjóðingina av ætlaðu barnagørðunum á Argjum og í Hoyvíkshaganum. Hann segði bara onki um, at mentamálanevndin hjá Tórshavnar Býráð er ikki á einum máli um, hvussu bjóðast skal út á hesum sinni.

Hetta málið endaði í eini fløkju, tí her var ov lítið gjøgnumskygni og ov lítil opinleiki. Landsstýrið segði kortanei til, at íløgan gjøgnum eitt leigumál millum byggimeistara og kommununa varð tambað yvir 15 ár , og kommunan gjørdi rís til egnan rass, tá hon brádliga vildi loyna tilboðini sum longst.

Loksins vísti tað seg, at útbjóðingartilfarið var so illa frágingið, at sama, hvør serfrøðingur varð spurdur, so kundi ongin gera av, hvat var besta tilboðið.

Tessvegna hava undirritaði og Tórfinn Smith tikið undir við, at barnagarðarnir verða bodnir út av nýggjum, men vit halda ikki, at tað er rætt, at tað verður gjørt í innbodnari totalentreprisu einans millum tey feløgini, sum buðu seinast.

Fyri okkum hevur tað alstóran týdning at tryggja fult gjøgnumskygni í málinum, sum hevur sín uppruna í einum tilboð frá einum býráðslimi, og tí mæla vit býráðnum eins og seinast til at bjóða ansingarstovnarnar út í almennari licitatión, har ein og hvør kann bjóða.

Tað kann jú vera, at feløg, sum ikki vóru hugað at bjóða upp á barnagarðar til at leiga býráðnum, eru sinnað at bjóða upp á barnagarðar, sum býráðið yvirtekur beinanvegin. Og jú fleiri, ið fáa høvi at bjóða, jú betri fyri kommununa og borgaran.

Vit halda eisini, at mesta rættvísi fæst í hesum máli, um kommunan sjálv útvegar tekningarnar, sum bjóðast skal uppá. Tá eru fyritreytirnar hjá øllum bjóðandi eins, og kommunan fær tað, sum hon vil hava.

At tey somu feløgini sum seinast nú skulu bjóða upp á sínar egnu tekningar eina ferð aftrat undir nýggjum fyritreytum kann lættliga elva til eina nýggja fløkju, sum fer at seinka teir sárt saknaðu barnagarðarnar nógv meir, enn gott er.

Og ólíkindini tykjast longu hava kostað eitt hálvt ár.

# Sinnisbati almenna skrivstovutíð

TÍÐINDASKRIV

Sinnisbati fer nú undir at hava almenna skrivstovutíð í hølum felagsins á Íslandsvegi 10 C í Havn. Opið verður hvønn mikudag kl. 16-18. Hvønn fyrsta mikudag í mánaðinum verður tó opið frá kl. 16-19.30.

### Fastir nevndarfundir

Sinnisbati hevur fastar nevndarfundir fyrsta mikukvøld í mánaðinum kl. 18-19.30. Tá er skrivstovan opin og er sostatt møguligt at hitta nevndarlimirnar tá.

Ein og hvør er vælkomin at seta seg í samband við nevndina tær tíðir, ið nevndar eru, umframt aðrar tíðir eisini.

Sinnisbati hevur tlf. 322544 og teldupostadressuna: sinnbati@post.olivant.fo